## Adrian Ilie funnið gaggurnar framaftur

Fyrrverandi rumenski landsliðsspælarin, Adrian Ilie, sum gavst at spæla fótbólt í 2006, hevur nú funnið gaggurnar framaftur og fer at spæla fyri Terek Grozny í næstbestu russisku deildini. 34 ára gamli Ilie gavst at spæla, tí knøini vóru farin at bila, men hevur nú hug at royna aftur. Adrian Ilie hevur spælt 55 landsdystir fyri Rumenia og skotið 13 mál.



## Tiger Woods útsligin í »come-back« dysti

Heimsins bestu golfspælari, Tiger Woods, sum í longri tíð ikki hevur fingið spælt fyri einum skaða, var beinanvegin útsligin, tá hann í gjár gjørdi »come-back« í óalmennu HM-kappingini í holspæli. Eftir steðg í átta mánaðir mátti Woods lúta fyri Tim Clark úr Suðurafrika, sum er nummar 33 á heimsstyrkilistanum, so enn er eitt petti eftir, áðrenn »tigarin« er aftur á toppinum.

# Jens Martin: Eg eri klárur

**Virkandi fótbóltslandsliðsvenjarin, Jens Martin Knudsen, sær fram til vinardystin ímóti Íslandi, sum verður spældur í Kórinnhøllini á Kópavogi sunnudagin 22. mars. Hann verður sjálvur annar, sum skal stýra landsliðnum ímóti grannunum fyri vestan**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Hóast vinardysturin ímóti íslendingum er um ein mánað, so tykist greitt, at tað ikki fer at eydnast Fótbóltssambandinum at finna nýggjan landsliðsvenjara til ta tíð. Tí verða tað tveir føroyingar, sum koma at taka sær av at seta liðið og stjórna landsliðnum frá síðulinjuni henda dystin.

Fyrr í vikuni segði forsetin í Fótbóltssambandinum, Høgni í Stórustovu, at ikki var neyðugt at hava funnið avloysaran fyri Jógvan Martin Olsen undan vinardystinum ímóti Íslandi í Kórinn-høllini á Kópavogi, og nú mestsum váttar formaðurin í landsliðsnevndini, Magnus á Stongum, at eingin venjari heldur verður settur áðrenn 22. mars.

Í øllum førum segði hann við 3-2 í gjárkvøldið, at tað verður virkandi landsliðsvenjarin, Jens Martin Knudsen, sum saman við einum øðrum føroyingi skal standa fyri fyrireikingunum til tann dystin. Jens Martin hevur sáttmála sum hjálparvenjari hetta landsliðsárið út, so tí er hann upplagda valið til at vera annar teirra, ið tekur henda dystin.

### Kennir íslendingar

– Eg eri klárur og til dystin fús, og tað skal heldur ikki vera nakað dulsmál, at júst ein landsdystur ímóti Íslandi er ein serliga stuttlig og spennandi avbjóðing, sigur Jens Martin Knudsen, sum síðstu fýra mánaðirnar hevur verið í tí løgnu støðu, at hann hevur verið hjálparvenjari, men uttan at hava nakran venjara oman fyri seg.

– Mín sáttmáli við Fótbóltssambandið er framvegis galdandi, so tí arbeiði eg upp á besta máta við fyrireikingum og øðrum. Eg skal so gera mítt til, at nýggi landsliðsvenjarin ikki skal standa púrasta á berum, tá hann eina ferð kemur.

Tá nú talan er um ein dyst ímóti júst Íslandi, er neyvan nakar betur førur fyri at gera fyrireikandi arbeiðið enn Jens Martin, sum sjálvur hevur verið bæði spælari og venjari í Íslandi fyri ikki so øgiliga langari tíð síðani. Tí hevur hann gott innlit í íslendskan fótbólt og kennir bæði spælarar og venjarar har yviri.



*Jens Martin Knudsen kemur sum virkandi landsliðsvenjari sjálvur annar at hava ábyrgd av vinardystinum hjá Føroyum ímóti Íslandi um ein mánað. Her er hann avmyndaður saman við Jákupi Mikkelsen, sum tekur hetta árið aftrat sum málverji á landsliðnum*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

– Enn vita vit ikki, um íslendingar ætla at hava nakrar ella ongar av sínum útisetum við í dystinum ímóti okkum, men eg fylgi so væl við, sum tað letur seg gera. Men hetta er so ein dystur, ið hevur nokk so nógv at siga fyri okkum, og nú vit fingu ein frammaná frá teimum har yviri fyri einum ári síðani, vilja vit sjálvandi vísa, at vit eru betri enn 3-0 til Ísland, sum tá stóð á máltalvuni, sigur virkandi landsliðsvenjarin.

# Ítróttarbreytin á Kambsdali gevur bóltin upp triðju ferð

**Hóast fíggjarligi karmurin bara loyvir, at ungir fótbóltsspælarar á ítróttarbreytini kunnu ganga á ítróttarskúla og miðnámsskúla samstundis, er handilsskúlin á Kambsdali opin fyri øðrum ítróttargreinum. – Men tað krevur fígging, sigur Páll Isholm, deildarstjóri.**

ÍTRÓTTARSKÚLI
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tá eitt nýtt skúlaár byrjar í august, byrjar samstundis tann triði árgangurin av næmingum á serligu ítróttarbreytini, sum Føroya Handilsskúli á Kambsdali nú hevur havt í tvey ár. Á ítróttarbreytini ber til hjá ungum og evnaríkum fótbóltsspælarum at ganga á ítróttarskúla og miðnámsskúla í senn.

– Vit hava alla tíðina havt eitt ynski um, at ítróttarbreytin kundi fevnt um aðrar ítróttargreinar eisini, men fíggjarligi karmurin loyvir tí ikki. So skulu vit fáa aðrar ítróttargreinar við, má í øllum førum meira fígging til, sigur Páll Isholm, deildarstjóri á Føroya Handilsskúla á Kambsdali.

– Í aðrar mátar hevði einki verið til hindurs fyri tí, tí vit hava fysiskar karmar í grannalagnum, eitt nú eina ítróttarhøll, umframt at her á leiðini eru fleiri ítróttarfeløg av ymsum slag. Og tað hevði heldur ikki kravt stórvegis tillagingar, um onnur enn fótbóltsspælarar skuldu fylgt breytini, sum hon er skipað og løgd til rættis nú.

At talan hetta triðja árið eisini bert verður um eitt tilboð til fótbóltsspælarar, hevur tó ikki verið nøkur forðing fyri, at áhugin hevur verið stórur, tí tey bæði undanfarnu árini hevur næmingatalið ligið um 15-16, og Páll Isholm væntar, at talið verður uppaftur hægri enn tað næsta skúlaár.

### Eisini uttanlands

Í hesum døgum verður søkt eftir næmingum til tær ymsu útbúgvingarnar, og fótbóltsspælarar kunnu tí søkja á ítróttarbreytina, samstundis sum teir søkja á FHS, tvey ára HH- ella trý ára HH-útbúgving á Kambsdali. Umsóknarfreistin er úti um góðar tvær vikur, tann 15. mars.

Á ítróttarbreytini er høvi hjá ungu næmingunum at liva sum ítróttarfólk, so teirra gerandisdagur eitt nú er merktur av røttum livihátti og miðvísari venjing. Talan er um tilsamans fýra tímar um vikuna, sum eru knýttir at ítróttarbreytini, har venjingarnar verða fyriskipaðar av venjarum við hægstu førleikum. Í ár er Sigfríður Clementsen høvuðsvenjari á ítróttarbreytini.

– Tey ungu hava verið ófør at møtt upp, sjálvt um venjing stendur á skránni tíðliga vetrarmorgnar, og í allar mátar hevur ítróttarbreytin riggað væl higartil. Tey bæði farnu skúlaárini hevur verið skipað fyri lestrarferð og venjingarlegu uttanlands, sigur Páll Isholm.

– Í báðum førum hevur ítróttarbreytin vitjað danska felagið AaB, har næmingarnir hava búð saman við javnaldrum á AaB College í Aalborg, vant hvønn dag og annars verið við til venjingar og sæð dystir. Bæði árini hevur talan verið um væleydnaðar ferðir, so hildið verður fram eftir hesum leisti eisini komandi skúlaár.